gult cyan magenta svart

gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin



# Frælsur tíðindaflutningur

## *Oddagrein*

Í seinastuni hevur verið tosað um, at bæði stóru bløðini í Føroyum hava verið ímóti samgonguni í m. a. fullveldismálinum.

Tað er sera týdningarmikið, at eitt mál verður lýst frá fleiri síðum, og tað má vera fremsta uppgávan hjá fjølmiðlum. At onkur hevur skotið upp, at »fullveldisvongurin« skal fáa nakrar síður í hvørjum blað fyri at tryggja óheftan tíðindaflutining er eitt útsagn , ið ikki ber til, og er ikki sørt niðurlátandi yvir fyri fjølmiðlunum. Tað má vera soleiðis, at tíðindaflutningur og politikkur er atskiltur, so tað er meiningsleyst at ein ávísur vongur skal bera tíðindi, ið so pr definitión ikki eru óheft. Ein og hvør kann senda greinar inn, men tað kemur undir viðmerkingar og ikki undir tíðindaflutning.

Bløð kunnu gjøgnum redaktiónina seta fram spurningar og verða kritisk, men slíkt verður ført fram á hesum stað. Tað er ein grov undirmeting av einum blað sum Sosialinum, tá fólk siga, at tíðindaflutingur verður littur og sigur ikki so lítið um hugsunarháttin hjá atfinnarunum.

Tað er eitt sindur meira erkvisni at hóma, nú fullveldisætlanin ikki gongur heilt sum samgongan hevði ætlað. Tað, ið tykist heldur løgið, tá hugsað verður um fullveldisfortalarar er, at spurningar verða ikki settir til sjálva ætlanina ella fyrireikingina av henni, men harafturímóti verða atfinningar havdar á lofti móti teimum, ið hava sett spurningar til gongdina.

Vit hava roynt at viðgjørt eitt nú Hvítubók við at endurgeva ymisk sjónarmið og hava roynt at dekka samráðingarnar við danir so væl, sum vit kunna. Vit hava so eisini sett fram spurningar í mannagongdini. Millum annað vístu vit á tað ivasama við at senda ein faldara í hvørt hús, ið skuldi eitast at vera kunning frá landsstýrinum, men var undirskrivaður vegna Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Slíkt átti ivaleyst at komið undir politiska upplýsing, og flokkar fáa stuðul til slíkt, so ikki er tørvur á, at Føroya Landsstýri stendur sum avsendari av slíkum. Spurningurin er, um ikki tað kann tulkast, sum at vandi er á ferð viðvíkjandi óheftari upplýsing, tá ein politisk ætlan verður send út sum »kunning«, og fólk byrja at tosa um, at ávísir politiskir bólkar skulu fáa síðir í bløðunum settar av fyri at tryggja óheftan tíðindaflutning.

Sum vit hava nevnt áður so er neyvan sæð fyrr, at so nógvir pengar hava verið brúktir til at kunna ella reklamera, um tað ber til at siga so, fyri einari ávísari politiskari ætlan sum fullveldisætlanini. Vit hava sæð heimasíður, faldarar, framløgur kring landið o.s.fr. Um borgarin ikki er samdur, so er tað neyvan tí hann ikki verður nóg væl kunnaður ella tí, at fjølmiðlarnir ikki dekka málið nóg væl. At siga tað, er tað sama sum at siga, at sokallaðu upplýsingarpengarnir eru burturspiltir. Er tað kanska hugsandi, at ein mótreaktión til massivu lýsingina av málinum frá almennari síðu ger seg galdandi?

***Sosialurin***

# Mentanarráðstevna í Grønlandi

Á hvørjum sumri heldur Útnorðurráðið ráðstevnu. Ráðstevnan í ár, har evnið er mentan, verður hildin í Qaqortoq í Suðurgrønlandi, í døgunum 13.- 14. juli 2000.

Umleið 60 luttakarar hittast á ráðstevnuni, bæði politikarar frá Útnorðurráðnum og Norðurlandaráðnum eins og umboð frá eini røð av norðurlendskum mentanarstovnum. Harafturat verða mentamálaráðharrarnir í Útnorðurráðnum við: fyri Ísland Björn Bjarnason, fyri Føroyar Högni Hoydal og fyri Grønland Lise Skifte Lennert. Tann danski mentamálaráðharrin, Elsebeth Gerner Nielsen, som eisini er formaður fyri teir norðurlendsku mentamálaráðharrarnar í ráðharraráð Norðurlandaráðsins, verður eisini við á ráðstevnuni.

Endamálið við hesi mentanarráðstevnuni er við framløgum og orðaskifti at geva íblástur til at meta um og menna mentanarliga samstarvið í Útnorði, og í hesum sambandi leggja høvuðsdentin á støðu Útnorðurráðsins í norðurlendska mentanarsamstarvinum. Ráðstevnan skal sum liður í hesum virka sum íblástur við at orða tilráðingar í sambandi við komandi ársfund.

Ráðstevnan hevur 3 høvuðsevni: „Mentanararvur í Útnorði“, „Útnorður sum partur av norðurlendska mentanarsamstarvinum“ og „Mentanarsamstarvið í Útnorði nú og frameftir“. Fólk frá londunum í Útnorði við tilknýti til mentan og mentanarpolitikk fara at halda fyrilestur um hesi 3 evnini. Hvørt evni endar við stuttum orðaskifti.

Ráðstevnan endar við, at mentamálaráðharrarnir í Útnorði hava framløgu um støðuna og framtíðarætlanirnar fyri mentanarsamstarvinum í Útnorði. Formaðurin fyri teir norðurlendsku mentamálaráðharrarnar í ráðharraráði Norðurlandaráðsins hevur ískoytisframløgu um støðuna og framtíðarætlanirnar fyri luttøku Útnorðurráðsins í norðurlendska mentanarsamstarvinum. Eftir framløgurnar verður felagsorðaskifti millum ráðharrarnar og hinar luttakararnar.

Føroysku umboðini í Útnorðurráðnum, sum luttaka, eru: Jógvan Durhuus, formaður, Lisbeth L. Petersen, Henrik Old og Eyðun Viderø. Harafturat luttaka Jóanis Nielsen fyri mentanarnevnd Løgtingsins, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í mentamálum.

Útnorðurráðið

# Bygningarnir í Brøttulíð verða avhendaðir

*Útnorðurráðið avhendar endurreistu bygningarnar i Brøttulíð, garðin hjá Eirikki Reyða og Tjóðhildarkirkju, til Heimastýrið í Grønlandi og Narsaq kommunu*

Útnorðurráðið fer sunnudagin hin 16. juli at avhenda teir endurreistu bygningarnar í Brøttulíð/Qassiarsuk til Heimastýrið í Grønlandi og Narsaq kommunu. Vígslan av bygningunum er ein partur af hátíðarhaldinum í Grønlandi í sambandi við 1000 ára haldið fyri, at Leivur Hepni rakti við Amerika og fyri fyrstu kristnifráboðanini í Grønlandi.

Hugskotið um endurreisn av garðinum hjá Eirikki Reyða og Tjóðhildarkirkju í Brøttulíð/Qassiarsuk varð lagt fram á ársfundi Útnorðurráðsins í 1992. Síðani hevur ráðið arbeitt miðvíst við málinum, og longu á vári 1997 var semja um arbeiðshátt og stevnumið. Hetta hevði við sær, at Útnorðurráðið og Heimastýrið í Grønlandi settu eina bygginevnd, sum síðani hevur havt ábyrgdina av setninginum. Árni Johnsen, altingslimur, hevur verið formaður í bygginevndini.

Byggifelagið Ístak hevur staðið fyri arbeiðinum, sum byrjaði í mai 1999. Eitt stórt tal av sponsorum hava veitt stuðul til endurreisnirnar. Teir, sum veitt hava størsta stuðulin, eru: Íslendska stjórnin og Heimastýrið í Grønlandi.

Endurreisnin av garðinum hjá Eirikki Reyða og Tjóðhildarkirkju skamt frá staðnum, har garðurin hjá Eirikki og Tjóðhildarkirkja í síni tíð vórðu bygd, fer at standa sum ein ævintýrakend samanrenning av søgu norðbúgva og Grønlandi í dag. Harafturat fara bygningarnir at hava ein stóran týdning fyri ferðafólkavinnuna í Grønlandi og fara at geva íkast til tað góða samstarvið innan ferðafólkavinnu, sum longu er millum tey 3 londini í Útnorði, sigur Útnorðurráðið

# Sigvald helt røðuna

Leygardagin í síðstu viku høvdu vit eina søgu um 1975 árgangin í Hoydølum, sum hevði verið saman og minst gamlar dagar. Í tí sambandinum søgdu vit, at Óli Jacobsen hevði hildið pisurøðuna í 1975. Hetta var ikki rætt. Tað var Sigvald Kristiansen, fyrrverandi lækni á Skála, sum helt røðuna tað árið. Vit biðja Óla, Sigvald og lesararnar orsaka okkum. Í røðu síni kom Sigvald inn á málstríðið, sum tá var í hæddini. Eitt brot úr røðuni stendur í bóklinginum um málstríðið, sum kom út á heysti í 1975. Tíverri stendur tað ikki undir røðuni, hvør helt hana.

Tá Sigvald Kristiansen í 1975 helt røðu á pisufundinum, vóru tað 25 ár síðani, at hann leyk stundentsprógv. Hann og hini, sum fingu prógv í 1950, vóru tá saman og mintust aftur á gamlar dagar. Tíðin flýgur avstað. Í summar hava Sigvald Kristiansen og fleiri av hinum, sum fingu prógv fyri einari hálvari øld síðani, verið saman aftur.
Sambært 50 ára minningarritinum hjá Føroya Studentaskúla vóru studentarnir í 1950 tíggju í tali. Tríggir málslingar og sjey matematikarar. Málslingarnir vóru Ingibjørg Johannesen, Skáli, Marjun Johannesen, Skáli og Alex Sólstein, Klaksvík.

Matematikararnir vóru Sverri Egholm, Vestmanna, Jacobina Jona Joensen, Klaksvík, Ásmundur Vágsheyg Johannesen, Klaksvík, Sigvald Kristiansen, Fuglafjørður, Byrgi Petersen, Klaksvík, Magnus Ólavur Simonsen, Saltangará og Ellen Kristian Weihe, Tórshavn.

**blm.**


*Sigvald Kristiansen var ein av studentunum í 1950*

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við gávum, blómum, telegrammum og á annan hátt mintust okkum á diamantbrúdleypsdegnum 30. mai 2000.

*Bestu heilsanir*
**Berlina og Erik Mørkøre,**
**Klaksvík**